# Eiðis kommuna bjóðar Sunda kommunu samstarv um bygging av læknamiðstøð

**- Í dag hevur læknin viðtalu á Eiði nakrar dagar í vikuni og nakrar aðrar dagar á Oyrarbakka, og eg haldi ikki, at umstøðurnar eru nøktandi, sigur Tordur J. Niclasen, borgarstjóri á Eiði, sum óttast tann dag, tá ið eingin lækni longur tímir at arbeiða í Eiðis læknadømi**



*- Vit ivast onga løtu í, at tað hevði stimbrað undir hugin hjá læknum at søkt starv her norðuri, um umstøðurnar vóru góðar, heldur Tordur J. Niclasen, borgarstjóri í Eiðis kommunu*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

LÆKNAMIÐSTØÐ
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Eiðis bygdaráð hevur á fundi einmælt samtykt at bjóða Sunda kommunu samstarv um bygging av eini læknamiðstøð í Eiðis kommunu.

Kommunurnar eru báðar partur av Eiðis læknadømi og samstarva frammanundan um eitt nú felagsskúlan á Oyrarbakka.

Aftur ígjøgnum tíðirnar hevur læknin í læknadøminum búð á Eiði, og tí heldur Eiðis kommuna, at tað er rímiligt, at læknamiðstøðin verður bygd í kommununi.

Tvey læknastørv eru normerað í læknadøminum, men bara ein lækni er í økinum. Tað er Magnus á Stongunum, sum plagar at hava ein dana at avloysa seg, tá ið hann ikki er til arbeiðis.

Søkt hevur verið eftir einum lækna aftrat, men líkt er til, at tað er miðstaðarøkið, sum dregur meira enn útjaðarin, og tí er hetta normeraða starvið ikki sett enn.

### Skriv er sent

Tordur J. Niclasen, borgarstjóri á Eiði, heldur, at tað hevði gjørt læknadømið meira attraktivt, um læknamiðstøð varð bygd til endamálið.

- Í dag hevur læknin viðtalu á Eiði nakrar dagar í vikuni og nakrar aðrar dagar á Oyrarbakka, og eg haldi ikki, at umstøðurnar eru nøktandi.

Hann sigur, at Eiðis kommuna hevur sent Sunda kommunu skriv, har lagt verður upp til samstarv um bygging av læknamiðstøð.

- Í skrivinum læsa vit okkum ikki fast í, hvussu nógvar fermetrar læknamiðstøðin verður, ei heldur hvørjar aktivitetir vit kundu hugsað okkum aftrat læknaviðtaluni, og vit taka heldur ikki støðu til, hvussu kostnaðarmikil ein tílík verkætlan skal verða.

Tordur sigur, at Eiðis kommuna er fegin um, at kommunurnar kunnu samstarv, og nú felagsskúlin liggur á Oyrarbakka, heldur hann tað vera rímiligt, at læknamiðstøðin verður løgd í Eiðis kommunu.

- Vit vildu tískil helst, at miðstøðin verður bygd á Eiði. Tað hevði verið nummar eitt, halda vit.

### Við Svínáir

Men Eiðis kommuna læsir seg kortini ikki fasta í, at læknamiðstøðin neyðturviliga skal byggjast á Eiði.

- Vit vilja strekkja okkum um neyðugt fyri at fáa í lag samstarv um læknamiðstøðina við Sunda kommunu.

Tordur sigur, at Eiðis kommuna í brævinum til Sunda kommunu vísir á, at miðstøðin eisini kann byggjast við Svínáir, sum eisini er partur av Eiðis kommunu.

Men síðan skilst á borgarstjóranum á Eiði, at einmælta samtyktin, sum bygdaráðið gjørdi á fundinum, 24. oktober, ikki røkkur longur.

Tordur sigur, at Eiðis kommuna kann útvega økið til læknamiðstøðina bæði á Eiði og við Svínáir, um tað skal verða, og tí vónar bygdaráðið á Eiði, at Sunda kommuna vil taka undir við ætlanini um felagsbygging.

- Vit hava tikið støðu í kommununi til at byggja eina læknamiðstøð. Vit óttast tann dag, tá ið vit kanska liggja í læknaloysi, tí eingin lækni tímir at seta seg niður her norðuri vegna vánaligu umstøðurnar í mun til, hvat miðstaðarøkið kann bjóða, sigur hann.

### Innan tvey ár

Hann sigur, at Eiðis kommuna tí ynskir, at ein læknamiðstøð verður bygd í nærmastu framtíð og helst innan eini tvey ár.

- Vit ivast onga løtu í, at tað hevði stimbrað undir hugin hjá læknum at søkt starv her norðuri, um umstøðurnar vóru góðar. Í eini tílíkari miðstøð kundu vit eisini havt ymisk heilsufremjandi tiltøk, men hetta verður so ein samráðingarspurningur millum kommunurnar báðar at taka støðu til, um avtalan um byggingina annars kemur upp á pláss, sigur borgarstjórin í Eiðis kommunu, Tordur J. Niclasen.

# Útróðrarmenn fáa fitt av fiski norðanfyri




ÚTRÓÐUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tá ið Sosialurin í morgun gekk fram við Kósabryggjuni, var ein útróðrarmaður komin aftur av útróðri.

Hann hevði fingið eini 1000 pund av fiski, 1/3 var hýsa og 2/3 gráur fiskur.

Hann sigur, at nú streymurin er betur aftur, og veðrið er gott, er nógvur bátur at síggja.

- Tað vóru nógvir bátar norðanfyri í nátt, og eg haldi, at teir yvirhøvur fiskaðu hampiligt.

Spurdur, um bátarnir liggja omanfyri 100 pund á línuna, segði hann, at tað gera teir reiðiliga.

- Okkum dámar væl, tá ið blandingur er í veiðini, t.v.s. at tá ið bæði toskur og h‡sa er á línuni.

Og soleiðis var tað í morgun.

- Flestu bátarnir egna gággu, sum nógvir veiða sjálvir. Aðrir keypa hana frá øðrum, ið veiða gággu, sum teir selja til útróðrarmenninar.

Á útróðrarmanninum skiltist, at summir egna á vanligan hátt við hond – og aðrir seta úr trakt.

Sjálvur helt hann fyri, at tað er minni arbeiði av at seta við trakt – og gággan hongur væl á húkinum, tá ið hon verður egnd í traktini.